# Ted Turner ynskir eina sjónvarpsstøð

**FJØLMIÐLAR.** Stovnarin av CNN, sum var fyrsta veruliga tíðindarásin í heiminum, hevur hug at selja síni partabrøv í fyritøkuni AOL-Time Warner og ístaðin keypa sjónvarpsstøðina NBS.

Hetta sigur ein av stjórunum í CNN í eini nýggjari bók, sum New York Times endurgav brot úr í vikuni.

Ted Turner, sum høvdingin í CNN eitur, hevur greitt leiðsluni í CNN frá síni ætlan.

Ein talsmaður fyri Ted Turner sigur við blaðið, at tað er einki nýtt í tí, at Ted Turner hevur hug at keypa sær eina sjónvarpsstøð, men at tað er burturvið at siga, at hann sjálvur fer at keypa eina líka, eftir at AOL og Time Warner løgdu saman.



# Per Zachariasen heiðraður

**HEIÐUR.** Danska sjónvarpssendingin, Floksveitslan, sum hevur føroyskan framleiðsluleiðara, hevur vunnið silvurrósuna við sjónvarpskappingina Rose D'Or í Montreux.

Tað er ikki á hvørjum degi, at ein føroyingur vinnur stóran altjóða heiður, men í vikuni fekk Per Zachariassen hendan heiðurin

Rose D'Or verður hildin eina ferð um árið, og allar tær stóru rásirnar eru við í kappngini. Floksveitslan, sum Per Zachariassen er framleiðsluleiðari á, vann kappingina í bólkinum "Light Entertainment" – lættari undirhald.

Sendingin, sum eisini er at síggja í føroyskum sjónvarpi, hevur verið ein av teimum best umtóktu í Danmark í longri tíð.

Fríggjakvøldið fer seinasta sendingin í hesum umfari av barkastokki og tá verða gestirnir filmsleikstjórin Susanne Bier og fíggjarmaðurin Klaus Riskær Pedersen. Henda sending verður væntandi at síggja í føroyskum sjónvarpi seinni í summar.

# Spilla pengar upp á eftirlit av matvørum

**MATVØRUR.** Ein trísiffrað milliónaupphædd verður brúkt til óneyðugar kanningar av matvøru, sigur ein nýggj kanning hjá Tekniske Videnskaber í Danmark.

Hóast víðfevnandi eftirlit við matvørum í Danmark seinastu árini, heldur frágreiðingin, at matvørueftirlitið er vánaligt.

Tað var milliónir í hópatali brúktar til óneyðugt eftirlit, sum í besta falli onga ávirkan hava í ringasta fall skapa eina falska trygd um matvørurnar.

Í Danmark verða hvørt ár gjørdar 3,5 milliónir mikrobiologiskar kanningar av matvørum. Kostnaðurin fyri hesar kanningarnar er 450 milliónir krónur, og teir pengarnir kundu verið nýttir nógv betur, sigur Mogens Jakobsen, sum er professari á Landbohøjskolen.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Tue 2.May. 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** justinus@t-online.de
**Reply to:** justinus@t-online.de

TELDU-POSTURIN

# Skruppforvirraður av fullveldistosinum

Eg eri skruppforvirraður av tjakinum um framtíðarstøðu Føroya. Hetta tjak, sum fyll-ir nógv í bløðunum. Og tað er ikki bara eg, sum eri ørkymlaður. Føroyingar heima eru eisini ørkymlaðir. Danir hava givið grønt ljós, vit kunnu loysa um vit vilja. Hetta var ikki akkurát sum vit føroyingar høvdu rokn-að við. Danir hava lagt harðar treytir við, serliga viðvíkjandi skiftistíðini við blokk-inum og tað er eitt klokkureint tekin um, at danir als ikki eru so fegnir yvir at føroyingar loysa. Teir eru stoltir av okkum. Teir eru góðir við okkum føroy-ingar og 600 ára samband er ikki so lætt at slíta.

Eg havi eina fullkomiliga greiða støðu til Kosovu, Groznyy, hungurin í Sudan, kubanska drongin í USA, dygdirnar hjá Monicu Lewinsky o.s.v. Alt hetta liggur so deiliga langt burturi. Men frælsisstøða Før-oya fær meg at kenna meg lítlan, tí eg veit hvørki út ella inn.

Føroyingar eru ørkymlaðir og okkara støða kann lættliga flytast inn í eitt vanligt hjúnalag, har alt ikki gongur eftir vild. Sigur annar í hjúnalagnum við hin: „Broytir tú ikki atburð, so fari eg," so er støðan álvar-slig. Svarar mótparturin aftur: „Jamen, far bara, eg eri líkaglað/ur," so er støðan upp-aftur álvarsligari. So kemur spurningurin snýkjandi aftur. „Júmen, eri eg ikki betri enn so, at hann/hon vil lata meg fara, so-leiðis uttan víðari?"

Tá ið tú fær slíkt svar frá tí sum tú hevur hótt við at fara frá, í vón um at fáa viður-skiftini betraði, so gerst tú ørkymlaður. Og tað er just tað eg kenni, at føroyingurin, eg sjálvur íroknaður, er í tjakinum um fram-tíðarstøðu Føroya.

Tjakið snýr seg slett ikki um hvat før-oyingar sjálvir vilja. Tað snýr seg um hvat hendir, um vit loysa og hvussu okkara fram-tíð verður við ella uttan loysing. Brennandi spurningurin um føroyingar vilja loysa verður slett ikki tikin upp á tunguna. Vilja føroyingar loysa, vil ein stórur meiriluti av føroyingum loysa, so er talan um eitt val og so er tað líka mikið hvussu samfelagið sær út aftaná loysingina. Tað mugu vit sku sjálvir klára. Tað er í hvussu er ikki prob-lemið hjá dønum. Fólkið vil vera frælst, so einfalt er tað. Og eitt fólk, sum vil verða frælst, spyr ikki eftir pengunum fyrst. Tað er ikki nokk heima, at byggja ynski før-oyinga um frælsi á seinasta løgtingsval. Vit eru von við protestval í Føroyum við jøvn-um millumbilum.

At vera føroyingur úti í heimi er rættuliga eyðmýkjandi í dag, júst tí fullveldismálið er beint heilt av leið. Frá at verða ynskið hjá eini lítlari tjóð at ráða í egnum landi við teim evnun sum skaparin gav, til at snúgva seg um hvussu nógv móðurlandið skyldar okkum fyri aldargamlar syndir og hvussu nógv móðurlandið skal gjalda. Tað snýr seg als ikki um frælsi, tað snýr seg um hvussu nógv breyð vit kunnu kradda frá móðurlandinum, breyð, breyð og aftur breyð og bara breyð.

Eg sigi slett ikki danir ringar fyri at halda føroyingar vera ótrúliga beroknandi og smáligar mótvegis dønum. Hvørt orð før-oyingar siga í donskum fjølmiðlum kann vendast soleiðis, at vit verða roknaðir sum smáligir og beroknandi, júst tí at okkara frælsisstríð ikki snýr seg um frælsi, men hvussu vit í fyrstu atløgu skulu fáa onnur at rinda fyri, at vit skulu ráða í egnum húsi. Tú sær ongar útronkingar, har fullveldið bara byggir á tað einasta vit kunnu rokna við vissu í Føroyum, nevniliga fiski-vinn-una. Allarhelst tí, at hendan klárar ikki at breyðføða føroyingum. Tú sær útrokningar um hvussu danir skulu gjalda fyri okkara frælsi, til oljuvinnan einaferð tekur yvir. Men oljan er ikki komin enn og tað verður roknað sum vánaligur siður úti í heimi at selja skinnið áðrenn bjørnin er skotin. Tað er ikki somikið av olju vunnið úr undirgrundini, at tað er nóg mikið til at smyrja Singer seymimaskinuna hjá frú Olsen norð-uri í Vík, tíansheldur at leggja frælsi tjóð-arinnar á.

Ikki ein einasti ein núlivandi danskari hevur ábyrgdina av, at føroyingar hanga upp í Danmark. Vit fylgdu við, uttan nakað serligt brennandi ynski frá dønum, í einum sáttmála fyri langari tíð síðan. Danir hava eisini uppført seg um hjálandamegi mót-vegis føroyingum, men í tí tíðini var tað hildið at vera rætt kring allan heim. Í hesum 600 ára hjúnarlagi er ringt hjá nútíðar danskaranum at skilja, at hann soleiðis skyldar føroyingum nakað. Hetta er næstan sum hjá unga týskaranum í dag, sum ongan-tíð hevur verið í kríggi. Hann spyr: „Hvussu leingi skulu vit gjalda fyri syndirnar hjá okkara forfedrum, okkara abbum."

Tá eg gekk á Danmarks Journalisthøj-skole fyri 20 árum síðan minnist eg, at ein skrivstovustjóri í Danska Uttanríkisráðnum var á skúlanum og helt ein fyrilestur um fiskivinnusamráðingar. Eg havi tíverri gloymt navnið, men hann er kendur millum føroyskar politikarar. Hann hevði fleiri ferðir tingast saman við føroyingum. Hann greiddi frá hvussu tey ymisku londini vóru at tingast við og at enda segði hann: „Før-oyingar vil eg næstan ikki taka upp á tung-una. Teir bara krevja og krevja og teir vilja einki geva ístaðin." Sum ungur komandi journalistur var eg ótrúliga særdur av hesum orðum. Í dag síggi eg, at hesin vitugi maður hevði rætt. Tað er tað eg siti eftir við, meðan eg fylgi við í føroyska fullveldistjakinum.

Tjakið eigur at vendast burtur frá hvussu onnur skulu gjalda fyri okkara frælsi. Tjakið má koma inn aftur á ta rás sum førir til um føroyingar vilja verða frælsir ella ikki. Nógv frælsisstríð vórðu strídd í farnu øld og hesi stríð endaðu mangan við, at frælsi varð bygt á toftirnar á einum sindraðum samfelag. Ynskja føroyingar frælsi, so er tað ikki so umráðandi, um okkara livifótur lækkar. Loysingin kostar, siga kønir fullveldismenn, men tað hevur ikki so stóran týdning, ynskir fólkið at verða frælst, ein stórur meiriluti av føroyingum. Tað kann vera, at føroyingurin heldur at tað er meira virðiligt, at vera ein heldur fátækur fríbóndi, heldur enn enn ríkur trælur. Um sjálvt frælsisynskið, heldur enn ynski føroyinga at fáa danir at rinda fyri okkara fíggjarligu vannstýring, var tað berandi i samráðingunum, so var lítil ivi um, at vit fingu meira goodwill frá dønum. Vit mugu koma burtur frá hesi biddaragongd, sum vekir so nógvan illvilja í danska fólkinum. Tað er heldur ikki virðiligt fyri okkum. Frælsisynskið hjá einum fólki eigur at byggja á frælsi fyri ein og hvønn prís. Nyrup hevur rætt, loysing kostar. Er hetta ynskið ikki í føroyinginum, so hava vit heldur ikki uppiborið frælsi. Og svar upp á hendan spurning fáa vit bara við eini fólkaatkvøðu við einfalda spurninginum. „Skulu vit loysa ella ikki, ja ella nei."

Og í meðan veit eg sjálvur hvørki út ella inn. Eg kenni meg sum ein part av The United Kingdom of Denmark. Danska sam-felagið hevur hýst mær i mong ár, meðan eg læs. Í dag hýsir tað soni mínum og gevur honum øll rættindi á jøvnum føti við allar aðrar 11 ára gamlar danskar dreingir. Tá fólk gerast ordiliga sjúk í míni familju, so fáa tey hjálp á danska ríkissjúkrahúsinum. Ein stórur partur av mínum vinum búgva í Danmark og nógv familja eisini. Megin-parturin av tí eg havi lisið er á donskum máli og eg veit slett ikki, um eg vil melda meg burtur úr hesum 600 ára gamla hjúna-lagi. Fyri mær er sambandið við Danmark so øgiliga nógv annað enn blokkur, krónur og oyrur. Tað er ein partur av mínum lívi, eg eri ein partur av einum minniluta í danska kongaríkinum og eg kenni ikki, at tað ger meg minni ella verri enn nakar annar í heiminum. Og føroying vil eg kenna meg allar dagar, um vit stýra sjálvir, ella í felag við Danmark. Og eg kenni ikki bara sum føroying, men eisini sum norðing. Eg var 12 ára gamal fyrstu ferð eg var í Havn.

Jústinus Leivsonur Eidesgaard
justinus@t-online.de



## FØÐINGAR

8. apríl fingu Hildigunn Olsen, Runavík og Bárður Bærentsen, Kaldbak eina dóttir. Hon var 50 cm long og vigaði 3320 gr.

24. apríl fingu Kristbjørg og Per Christensen, Fuglafjørður, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3725 gr.

2. mai fingu Maria Mørkøre og Kristian Hansen, Klaksvík, bús. í Vanløse, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3500 gr.

3. mai fingu Birgit og Hans Christian Isaksen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3500 gr.

4. mai fingu Atli og Elly Jensen, Sandur, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 4450 gr.

4. mai fingu Beinta Karbech Hansen, Funningsfjørður og Kristian Johannesen, Funningur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

4. mai fingu Leila S. Dalabrúgv og Bárður Klakkstein, Klaksvík, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3750 gr.

4. mai fingu Fríðbjørg og Harry Abrahamsen, Streymnes, eina dóttir. Hon var 50 cm. long og vigaði 3325 gr.

5. mai fingu Jacoba og Tórhallur Staksá, Viðareiði, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3800 gr.

6. mai fingu Poul Laksáfoss og Kára Zachariassen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3300 gr.

8. mai fingu Anita og Súni S. Jaocbsen, Argir, eina dóttir. Hon var 56 cm. long og vigaði 3600 gr.

8. mai fingu Ruth og Jens Glerup, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3380 gr.

8. mai fingu Irena Nolsø og Bjarni Poulsen, Keypmannahavn, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

9. mai fingu Sigga M.S. Jørgensen og René J. Laursen, Århus, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.

10. mai fingu Nadine Jacobsen og Jón Egil Glyvradal, búsitandi í Lemvig, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

11. mai fingu Ragnfríð og Høgni Petersen, Rituvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4025 gr.

## ANDLÁT

4. mai
**Frits Olsen,** Klaksvík, 73 ár
**Jóhann Wenningsted,** vanliga nevndur Venne, ættaður úr Skopun, búsitandi í Esbjerg, 89 ár
**Maria Fossdalsá,** Á Nesi, 79 ár

6. mai
**Dánjal Christiansen,** ættaður úr Toftum í Vági, 88 ár
**Birita Mohr,** hjá Leivi Mohr og Onnu Rúnu Jacobsen í Kollafirði, 10 ár
**Elvar Højgaard,** Vopnafjørður í Íslandi, sonur Elly Højgaard av Sandi, 40 ár

7. mai
**Sigga Malena Rasmussen,** fødd Poulsen, úr Søldarfirði, ættað úr Frammistovu í Hvannasundi, 89 ár

8. mai
**Poula Sørensen,** Øravíkarlíð Tvøroyri, 64 ár
**Herna Heinesen,** fødd Niclasen, ættað úr Sørvági, búsitandi í Åmot, Skien í Norra, 54 ár
**Julia Sylvesta Højgaard,** á Toftum, 67 ár

10. mai
**Hilmar Jacobsen,** Víkarbyrgi, 75 ár
**Napoleon Olsen,** Poli, búsitandi í Havn, ættaður úr Hósvík, 79 ár
**Karl Høj,** Strendur, 79 ár
**Helga Hansen,** Eiði, 76 ár

## Eitt ljós á gøtu míni



### Páskaboð – 3. leygardag eftir páskir

*»Men eftir hetta opinberaðist hann í einum øðrum líki fyri tveimum av teimum, meðan teir vóru á gongd út á bygd. Og hesir fóru og boðaðu hinum hetta. Men heldur ikki teimum trúðu teir«. (Markus 16,12–13).*

Hin tóma grøvin páskamorgun er trúnni ein ríkur vitnisburður. Hendan útsøgnin er enn ríkari vegna tess, at Jesus sum hin upprisni opinberaði seg fyri kvinnum og monnum. Maria Magdalena sá hin upprisna, og nú lósu vit um teir báðar lærusveinarnar, ið vóru ávegis út á bygd.

Lukas evangelistur veit frá at siga, at hesir báðir ferðamennirnir eru ávegis til Emmaus, ið liggur seks fjórðingar frá Jerúsalem. Á ferðini tosa teir um tað, ið hent var hesar seinastu dagarnar. Meðan teir soleiðis ganga og práta, fáa teir ferðalag av einum ókendum.

Hesin fremmandi kemur væl inn í samtaluna, og teir báðir ferðamennirnir til Emmaus greiða frá Jesu lagnu, hvussu høvuðsprestarnir og ráðsharrar fólksins góvu hann inn undir deyðadóm og krossfestu hann.

Venda vit aftur til Markus stendur at lesa, at lærusveinarnir heldur ikki trúðu frásøgnini frá hesum báðum ferðandi. Jesus opinberaði seg og sýndi seg fyri teimum, men hetta gav ikki endurljóð í lærusveina hópinum so við tað sama. Tað var heldur tungt hjá trúnni at vakna til lívs.

Og líkasum uppreisn Jesu Krist frá deyða og grøv er eitt undur, á sama hátt er við trúnni. Uppreisn Jesu Krist er Guðs verk. Guð grípur inn í heimssøguna, Miðeystur verður ein partur av frelsisøgu Guðs.

Eisini trúgvin er eitt undur. Hjá Lukasi fáa vit at vita, at Jesus og hesir báðir ferðamennirnir koma ásamt um at vera saman, tí kvøldið er komið og náttin stundar til. Tá teir settust til borðs, tók hesin ókunnugi maðurin breiðið, vælsignaði og breyt tað og gav teimum.

Trúgvin er ein Guðs gerningur í einum mannahjarta. Guð føðir trúnna til lívs við sínum gerningi. Skrivað stendur í sambandi við breyðbrótingina hendan dagin í Emmaus: »Tá opnaðust eygu teirra, og teir kendu hann«.

Og júst soleiðis gjørdist tann tóma grøvin eini gleðiboð burturav, tí tann tóma grøvin var staðfest við opinbering Jesu Krist, tá hann sýndi seg livandi og upprisnan millum lærusveinarnar.

Og tess vegna verður prædikað enn í dag, tí eisini vit eru komin til trúgv og hava sæð dýrd Jesu, dýrd sum einborin sonur hevur frá faðir sínum, fulla av náði og sannleika. Amen.

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Gudstænastur 3. sunnudag eftir páskir
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen (Talvan gongur fyri Blákross í Føroyum)
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein. (Talvan gongur fyri Blákross í Føroyum)
*Argir:* kl. 11, Kjartan Mørkøre
*Kaldbak:* kl. 12, Sverri Steinhólm, altargangur
*Kollafjørður:* kl. 11, konfirmatión, Marjun Bæk
*Miðvágur:* kl. 11, altarg., deyvagudstænasta, Jónsvein Bech. (Talvan gongur fyri deyvameinigheitina)
*Haldarsvík:* kl. 11,
*Tjørnuvík:* kl. 12, Martin Restorff Jacobsen
*Sjóvar kirkja:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson
*Gjógv:* kl. 11 messa (útvarpað)
*Funningur:* kl. 12.30, messa, Emil Olsen
*Hov:* kl. 11,
*Porkeri:* kl. 12.30, Elsa Funding
*Vágur:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Hvalba:* kl. 12.30, Ólavur Rasmussen
*Skúvoy:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Fuglafjørður:* kl. 11, Uni Næs
*Christianskirkjan:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
*Mikladalur:* kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
*Viðareiði:* kl. 11,
*Kirkja:* kl. 17,
*Hattarvík:* kl. 19, Meinhard Bjartalíð

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti. Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 06 morgunbøn, kl. 17 landsbøn.

Sunnudagin kl. 06 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta við Egon Falk, kl. 16 samkomufundur, kl. 22 útimøti (um viðrar).

Mánadagin kl. 06, kl. 10.30 og kl. 16 bøn.

Týsdagin kl. 06 morgunbøn.

### Frelsunarherurin í Havn
Sunnudagin kl. 11 møti, Major Inger Sofie Tjåland talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti, Inger Hansen talar.

### Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli, vitjandi úr Danmark luttaka.

Mánadag til fríggjadag kl. 06 morgunbøn.

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Mánakvøldið kl. 20 verður ungdómsmøti við Sólbjørg Símunarsson. Evni verður: Etisk lívsáskoðan.

### Ungdómstiltak
Í dag 13. mai kl. 15: Seminar fyri ungdómsleiðarar og onnur áhugaði í Filadelfia, tilm. á tlf. 214088, 217733, 222131 og 313492 ella á mail: tpo@gospel.fo

Kl. 21 Live í Lindini FM101, kl. 23 ungdóms-praisemøti í Evangeliihúsinum. Náttar-evangelisering aftaná.

Sunnudagin kl. 11 møti í Rhema á Hálsi, kl. 18 møti í Evangeliihúsinum, kl. 22 Filadelfia útimøti á Vaglinum.

### KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin 15. mai kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Jákup Magnussen presti, bíbliutími.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Niklas Mikkelsen og Petur Magnusson.

### Sunnudagsskúlin og Meinigheitshúsið í Havn
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14 við trúboðaranum Elsu Jakobsen og etiopearanum Jákup og Jóhannus.

Kl. 18 møti við Petur Nolsø. Innsavnan til ytrimissión.

### 1000-ára haldið
Fríggjadagin kl. 20 letur framsýningin um kirkjurnar í Føroyum upp í Leguhúsinum í Nesvík. J. P. Gregoriussen, arkitektur hevur skipað fyri og greiðir frá.

Fríggjadagin kl. 19 heldur Heini F. Petersen fyrilestur um Mikkjal á Ryggi í Listaskálanum. Kórið Glymur syngur.

Sunnudagin kl. 16 heldur Magnus Jørgensen fyrilestur um Kaj Munk í kirkjuni í Saksun. Vestmanna Sangkór syngur.

Sunnudagin kl. 15 heldur Jákup R. Hansen, prestur, fyrilestur í skúlanum í Skúvoy.

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 møti, vitjan úr Filadelfia, Vágar.

### Zion, Kollafjørður
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Øll eru vælkomin.

### Ársmøti hjá Heimamissiónini
Ársmøti hjá Heimamissiónini verður í Nesvík dagarnar 18.-21. mai. Á skránni eru møtir, gudstænastur, ungdómstiltøk, barnatiltøk, orðaskifti um arbeiði o.a. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Kirkjan, Norðskála
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin í kirkjuni. Víst verður á tiltakið í ítróttarhøllini í Runavík kl. 15 sunnudagin.

### Eydnan, Oyrarbakka
Møtirøðin við trúboðaraparinum Hanne og Egon Falk verður hósd-, fríggjad.- og leygardagin kl. 20 og sunnudagin kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Leirvík
Ungdómsmøti verður í Missiónshúsinum í Leirvík, leygardagin 13.5. kl. 20 við Árna Jacobsen.

### Ítróttarhøllin í Runavík
Tiltakið sum Heimamissiónin skipar fyri: sunnudagsskúlin ár 2000 »Eingin er ov lítil til Jesus«, verður sunnudagin 14. mai kl. 15. Tiltakið er fyri alla Eysturoynna. Øll eru hjartaliga vælkomin!

### Missións- og ungdómshúsið, Glyvrar
Sunnukvøldið kl. 19 møti við John Myllhamar, trúboðara. Innsavning til missiónsarbeiðið.

### Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 við Vagn í Geil, Tórshavn.

Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Jonnu og Palla, Gerðisvegur, Saltangará.

Hósdagin kl. 20 bønarmøti.

Morgunbøn er mána-, miku- og fríggjamorgun frá kl. 6-7.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 20 møti v/Jens Vestergaard og øðrum.

Sunnudagin kl. 17 møti við Jens Vestergaard og øðrum. http://kort.olivant.fo/~keldan/

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við John og Tove Hammer. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Vági
Í kvøld kl. 20 møti við Bergi D. Joensen. Magni Christiansen syngur. Innsavning. Sunnudagin kl. 14 familjumøti og kl. 18 møti við Bergi Debes Joensen. Magni Christiansen syngur. Drekkamuður verður bæði kvøldini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur.

Mánadagin kl. 20 bønarfundur.

Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

### Samkoman, Sion Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.

Telefonandaktin svarar á 373777.